

*Her sæst TB, sum var eitt beinleiðis úrslit av virkseminum hjá tuberklafelagnum*

2 kjólar
4 ulltroyggjur (við høgum hálsi og longum ermum)
4 pør av ullintum sokkum
3 pør av buksum
skjúrt
4 serkir
3 náttroyggjur
12 lummaturrikløð
1 skógvar ella styvlar
1 kapskógvar
1 morgunskógvar ella 4 pør av rotuskóm við skóleistum
1 oljuklæði við sydvesti
1 klædnabust

Um sjúklingurin átti eitt lummaur og galosjir og posatroyggju, átti hetta at vera tikið við. Meira átti ikki at verða tikið við, tí tað kundi illa fáast pláss fyri meira í skápinum, sum sjúklingurin fekk á sjúkrahúsinum. Sjúklingurin skuldi eisini hava kamb ella hárbust við umframt tannbust. Hetta kundi tó eisini fáast til innkeypsprís á sjúkrahúsinum. Átti sjúklingurin eitt læknatermometur skuldi tað takast við.

Á øllum klæðum skuldi seymast eitt nummar, sum sjúklingurin fekk sendandi.

Sjúkrahúsið átók sær ikki at goyma ov stór kuffert. Men tað kundi hava virðislutir í varðveitslu.

## Talan var um tvey sjúkrahús

Í Dimmalætting og Tingakrossi var dagfest 21. mai ein frágreiðing frá amtmanninum Christian Bærentsen "Om optagelse paa Sygehuset i Hoydal".

Hetta er ein frágreiðing til almenningin og eisini vegleiðing til komandi sjúklingar og fara vit at taka brot úr hesi grein, sum eisini kom som serprent.

*Sagt verður milum annað:*

Vanliga verður tosað um sanatoriið sum eina eind. Men tað er ikki heilt rætt. Talan er um tvær sundurskildar deildir. Onnur er ein "Folkesanatorieafdeling" og hin er ein "Tuberkulosehospitals afdeling", sum hvør hevði pláss til 16 sjúklingar. Hvør deild hevði átta sjúklingar av hvørjum kyni.

Tilsamans vóru tískil 32 pláss.

Á teirri fyrru deildini skuldu bert viðgerðast fólk, sum høvdu lungnatuberklar á byrjunarstigi, meðan á seinnu deildini vóru sjúklingar, har sjúkan hevði gjørt meira vart við seg. Deildin var serliga ætlað slíkum, "der af særlige, ofte kun foreløbige Grunde, ikke kunne drage tilbørlig. Nytte af Behandlingen paa et Sanatorium." Í báðum førum var bert talan um sjúklingar við tuberklum í lungunum.

## Gjaldið og kostnaður

Gjaldið á sanatoriudeildini var kr. 3 um dagin fyri hvønn sjúkradag og kr. 2 fyri børn undir 15 ár. Á hospitalsdeildini var gjaldið ávikavist kr. 2,50 og kr. 1,66 um dagin.

Men fyri "ubemidlede" rindaði staturin ¾ av hesum. Tað var vist eisini so, at sjúkrakassin rindaði gjaldið hjá sjúklinginum hjá sínum limum.

Síðan greiðir amtmaðurin frá, at tað er "Færøernes Amtskommune", sum hevur staðið fyri byggingini av sanatoriinum við tilskoti frá statskassanum. Hetta tilskotið hevur verið upp til kr. 2.000 pr. song, tó ikki meira enn kr. 60.000. Roknað verður við, at hetta dekkar helvtina av kostnaðinum. Danska tuberklafelagið hevur stuðlað við 10.000 krónum. Samlaði kostnaðurin var um kr. 130.000.

Statstilskotið verður mett til at verða kr. 23.944 við fullsettum sjúkrahúsi.

Tórshavnar Kommuna hevur uttan viðurlag fyri 50 ár, og við møguleika fyri framleinging í enn 50 ár, latið sanatoriinum brúksrætt til økið í Hoydølum. Hon hevur eisini latið gera veg niðan til Hoydalsá. Hetta arbeiðið var boðið út, og boðini lógu um kr. 1,50 – 2,00 fyri hvønn favn.

# Tuberklafelagið

**Vit fara nú at loypa fram til 1920-ini. Tuberklarnir gerast ein sótt, sum kostar eini 30 lív árliga. Tað verður meira og meira ein fólkasak at berjast móti hesi sótt**

Í 1924 verður stovnað Føroya Felag móti Tuberklasjúku. Tilfarið til hendan partin av greinini, stóð í 2003 í FF-blaðnum. Álvur Danielsen útvegaði keldutilfarið.

Orsøkin fyri stovnanini av tuberklafelagnum varð umrødd í 50-ára ritinum hjá Havnar Sjúkrakassa. Her verður greitt frá teimum innleggingum, sum sanatoriulæknin ella sjúkrasysturin gjørdu – ofta vóru tað sjúklingar av bygd. Síðan verður sagt um umstøðurnar hjá fólki, sum verða innløgd:

*Ofte manglede Folk det nødvendige Tøj, eller naar det var Familieforsørgeren eller Hustruen, kunde frygten for hvordan det skulde gaa den øvrige Familie økonomisk i den Tid, Sanatorieopholdet varede bevirke, at Patienten undslog sig for at forlade Hjemmet. I saadanne Tilfælde hjalp Foreningen dem med det nødvendige Tøj eller ydede en maanedig Understøttelse til Familien eller hjalp paa en anden maade, alt efter som de særlige Forhold i hvert enkelt Tilfælde krævede.*

Hetta er ein søga um ein dapran part í okkara søgu, men hetta er eisini ein positiv søga um viljan at berjast ímóti teirri vanlagnu, sum rakti nógv.

Støðan var tann, at tað var ikki nøkur rættilig viðgerð fyri tuberklar. Fremsta viðgerðin var at fáa nógv og gott at eta og at vera nógv í frískari luft. Sjúkralegan kundi tí vera sera drúgv. Kenni sjálvur mann úr Mikladali, sum lá 10 ár í Hoydølum. Hann slapp heim eina ferð øll hesi árini, og pápi hansara kom eina ferð at vitja hann. Tað er ringt at ímynd sær, hvussu trupult hetta má hava verið.

## Sanatoriets Jul

Eitt dømi um hetta er stubbin við hesi yvirskrift, sum stóð í bløðunum í desember 1932, undirskrivað av læknanum Erik Lynge:

*I mange Aar har Sanatoriet til Julen modtaget talrige Gaver fra Nær og Fjern med det Formaal at gøre Julen festlig for disse syge, der er afskaaret fra at fejre Højtiden i Hjemmet.*

*Patienterne har i Aar et stort Juleønske, som de har bedt mig fremkomme med overfor de mange, som aarligt plejer at tænke paa dem ved denne Lejlighed.*

*De ønsker sig installeret en Radiomodtager her paa Sanatoriet. Enhver vil kunne forstaa, hvad et saadant Apparat vil kunne bringe af Adspredelse, Belæring og fornøjelse i den ensformige Dag paa et Sanatorium.*

*Det er Patienternes eget Ønske, at de Gaver, der eventuelt indkommer ved Juleindsamlingen i Aar, skal benyttes til dette Formaal.*

*Jeg beder derfor de mange, der Aar efter Aar har glædet vore Patienter i Julen ikki at glemme os i Aar, men hjælpe os til at opfylde deres Juleønske.*



*Peningakassin hjá tuberklafelagnum, vanliga kallaður "landskassin"*

## Stórur offurvilji

Helst munnu sjúklingarnir hava fingið sítt radio. Men størsta tiltakið var, tá ið Føroya felag móti Tuberklum varð stovnað í 1924. Í hesum sambandi kann vísast til fyrstu frágreiðingina hjá felagnum. Hendan frágreiðing kann fyri ein stóran part sigast at vera søgan aftanfyri tann partin av Landssjúkrahúsinum, sum kallaðist TB, og sum var ein partur av stríðnum móti tuberklum.

Her var, sum tað skilst, stórur offurvilji og nógv virksemi. Hetta sæst ikki minst av fyrsta roknskapinum hjá felagnum, sum var frá stovnan og til árslok 1925.

Inntøkurnar vóru tilsamans kr. 14.000. Tað er ikki lætt at sammeta hetta við tøl í dag. Men um vit siga, at tímalønin í dag er 200 ferðir henni í 1924, so svarar hetta til útivið 3 mill. Her sæst eisini, at ein einstakur gevari, Tømmerhandler Jacobsen, København, hevur latið kr. 2.000, sum má sigast at hava verið ein risaupphædd. Seinni lat Føroya Banki, eina líknandi upphædd, eins og nógv onnur dugnaðu felagnum. Fyrsti formaður hevur verið Hjalmar Heerup amtslækni.

Árliga limagjaldið í felagnum var kr. 2 ella kundi gjaldast kr. 100 eina ferð fyri allar.

Í frágreiðing í søgu hjá sjúkrakassunum verður greitt nærri frá hesum felagnum, sum sjálvsagt hevði neyvt samband við virksemið hjá sjúkrakassunum, sum rindaðu sín part av kostnaðinum.

Ein stórur partur av virkseminum var at linna um hjá teimum húskjum, sum vóru rakt av tuberklum. Hetta kravdi nógvan pening, og tað vóru nógvar góðar kreftir, sum hjálptu. Tey flestu hava hoyrt um svenska filmmannin Nordenskjøld, sum gjørdi film úr Føroyum í 30-unum. Yvirskotið av hesum filmi gav hann felagnum.

So við og við gjørdist tíbetur minni og minni brúk fyri felagnum, og at enda varð tað avtikið í 1962.

## Tuberklafelagið útvegaði sjálvt hospital

*Í fyrstu frágreiðingin hjá Tuberklafelagnum sigur formaður Hjalmar Heerup:*

Efter en forberedende Foredragstourne stiftedes den 19. Oktober 1924 den færøske Forening til Tuberkulosens Bekæmpelse med det Formaal at vække Befolkningens Interesse for Kampen mod den voksende Tuberkulose her paa Øerne. Foreningen fik Navnet "Føroya Felag móti Tuberklasjúku", og tæller nu 1149 Medlemmer.

Når man nu udgiver en Beretning om den forholdsvis korte Tid, Foreningen har bestaaet, er Hensigten dobbelt - dels at styrke Interessen hos de Medlemmer, der allerede staar i Foreningen, ved at vise, hvad den har udrettet, og dels at virke i Foreningens Hensigt ved